Nr. 98/2019

Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi tannviðgerð, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvør kann í dag fáa serligt fíggjarligt ískoyti til tannviðgerð?
2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rímiligt, at fólk við tannsjúkum ella tannskaðum sum fylgja av aðrari sjúku, sjálv skulu rinda fyri tannviðgerð?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakrar broytingar á hesum økinum?

Viðmerkingar:
Í ríka vælferðarsamfelag okkara hava vit møguleika fyri at fáa ókeypis sjúkrahjálp, tí viðgerðin verður fíggjað umvegis felagskassan. Men tað er ikki galdandi á øllum økjum. Verða vit sjúk í tonnunum ella fáa tannskaðar, eitt nú sum fylgja av aðrari sjúku, so mugu vit í allarflestu førum sjálv rinda rokningina.

Summi hava ráð, men tað eru eisini nógv, sum merkja stóran fíggjarligan smeit aftaná tannlæknavitjan. Spurnartekin kann setast við, um tað er rætt, at hesin parturin av heilsuverkinum ikki í størri mun verður fíggjaður umvegis felagskassan. Serliga kann tað tykjast órættvíst fyri tey, sum orsakað av sjúku fáa avbjóðingar við tonnunum. Sum dømi kunnu nevnast fólk við epilepsi, ið sum avleiðing av herðindum aftur og aftur fáa skaða á tenninar, ella fólk, sum hava fingið staðfest sjúku í munninum ella svølginum, sum ger stóran skaða.

Spyrjarin ynskir at fáa betri yvirlit yvir, hvør í dag hevur rætt til at fáa ískoyti til tannviðgerð, og um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at gera broytingar á hesum økinum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 11. juni 2020

Ingilín Didriksen Strøm